Neistin-VÍF 27-23(13-9):

# Truplari enn væntað

**Eitt styrkt VÍF-lið gjørdi uppgávuna hjá neistakvinnunum truplari enn væntað var. Nicolina Eyðbjørnsdóttir var fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum at síggja á liðnum hjá vestmannakvinnum**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

VÍF hevði styrkt seg við Nicolinu Eyðbjørnsdóttir og Alis Høghamar til dystin móti Neistanum í Havn sunnudagin, og við eitt sindur av hepni hevði tað kanska eisini eydnast VÍF at fingið okkurt burtur úr dystinum.

## Gott undirhald

Teir okkurt um hálvtannaðhundrað áskoðararnir, ið høvdu leitað sær niðan í høllina á Hálsi til dystin millum Neistan og VÍF, fingu gott undirhald fyri pengarnar. Dysturin var í løtum heilt væl leiktur, og nógv góð mál vóru eisini.

VÍF legði bragdliga fyri, og tær løgdu seg eisini á odda tíðliga í dystinum. Nicolina Eyðbjørnsdóttir, sum er komin aftur eftir hondbóltsuppihaldi í Spania, var sum áðurnevnt aftur at síggja á VÍF-liðnum, og hon gjørdi beinan vegin vart við seg. Av teimum seks málunum, sum VÍF fekk fyrsta korterið, skeyt hon tey trý. Tá var støðan 6-4 til VÍF.

Í seinnu hálvu av fyrra hálvleiki kom heimaliðið meira fyri seg, meðan gestirnir úr Vestmanna steðgaðu upp eina løtu. Hetta førdi við sær, at Neistin frá at verða aftan fyri við tveimum málum, bráddliga legði seg á odda við fýra málum, áðrenn farið var til hálvleiks.

## Manuela stóð væl

VÍF tók seg inn aftur á Neistin beint eftir steðgin, men hvørji ferð at tær vóru nær við, fekk heimaliðið svarað aftur. Vestmannakvinnurnar vóru eisini eitt sindur óhepnar hesa løtuna, tí marginalarnir vóru ikki við teimum.

At tað gekk striltið hjá Neistanum at fáa lagt seg avgerandi á odda í dystinum, var eisini málverjanum hjá VÍF, Manuelu Stan, fyri at takka. Manuela stóð ein sera góðan dyst, og hon hevði fleiri góðar bjargingar frá púra leysum neistaleikarum.

Tað eydnaðist Neistanum at halda seg framman fyri VÍF, og tá ið teir 60 minuttirnir vóru farnir aftur um bak, stóð tað 27-23 til Neistan á máltalvuni. Harvið heldur Neistin fast í bronsuplássinum, nú farið verður undir endaspælið.

Hinvegin kann staðfestast, at nú VÍF hevur styrkt sær um liðið, man lítið verða at ivast í, at tær fara geva hinum liðunum dyggari mótstøðu og fara óivað at fáa fleiri stig til høldar.



*Tað gekk ikki heilt so lætt, sum roknast kundi við, tá Neistakvinnur sunnudagin tóku ímóti VÍF*

**Neistin-VÍF 27-23(13-9)**
**Neistin:** Simona Petersen 11(6), Ása á Neystabø 6, Annika Thomsen 3(1), Marjun Tróndarson 2(1), Lív Sørensen 2, Mildrið Jacobsen 1, Jórun Ludvig 1, Unn Kragesteen 1
**VÍF:** Ioana Rapa 9(2), Nicolina Eyðbjørnsdóttir 4(1), Fríða Marjunardóttir 4(1), Finngerð Jensen 3, Eyðrit Andreasen 2, Linda Johannesen 1
**Brotskøst:** Neistin 10(8), VÍF 5(4)
**Útvísingar:** Neistin 2, VÍF **3**
**Dómarar:** Heri Petersen og Brandur Johansen

Kyndil-H71 30-23(18-13)

# Kyndil vann á H71

**Við at vinna á H71, samstundis sum VÍF snávaði í Vestmanna, stríddi Kyndil seg sunnudagin upp aftur á oddasessin í Atlantic Airways-kappingini**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

H71 hevur leingi verið ónda marran hjá Kyndli, men nú hava teir grønu úr Havn vunnið á hoyvíkingum tvær ferðir á rað í landskappingini, so nú halda tey flestu Kyndla-viðhaldsfólkini, at H71-kompleksið er farið í søguna.

## Skjótt spæl

Tað tóktist sum um, at bæði liðini høvdu avtalað, at bestu ráðini vóru at spæla sera skjótt. Undir øllum umstøðum var tað soleiðis fyrstu løtuna, at tað gekk ómetaliga skjótt úr enda í annan, og liðini vóru ógvuliga skjótt at royna seg við skotum upp á mál. Sjáldan sást tú, at annað liðið líka setti ferðina niður og spakuliga koyrdi bóltin runt í álopinum, áðrenn roynt var við onkrari álopsskipan.

Kyndil legði seg beinan vegin fram um hoyvíkingar, og teir hildu seg framman fyri gestirnar allan dystin. Eftir at tað hevði staðið á jøvnum 4-4, tá ið slakir tíggju minuttir vóru leiktir, fór Kyndil frá H71, sum ongantíð kom upp á javnt aftur.

Seinastu dystirnar hevur Høgni Klein ikki verið at sæð á Kyndlaliðnum, men sunnudagin var hann við aftur, og tað gjørdi góðan mun. Høgni skeyt fýra av málunum hjá heimaliðnum fyrsta korterið, men bleiv síðani spardur rættuliga nógv, tí at hann ikki er komin heilt fyri seg eftir skaðan í fótinum, sum hann fekk í landskappingardysti á Skála.

H71 hevði hvørki Niels Viggo Niclasen ella Birgir Kass við í hópinum sunnudagin. Hví Niels Viggo ikki var við, eydnaðist okkum ikki at fáa uppspurt, men Birgir hevur boðað frá, at hann er givin við hondbólti á høgsta støði, tí at hann er so nógv upptikin av sínum arbeiði.

Eftir farna vikuskifti, tá ið H71 var fyri ósigri móti strandingum í Hoyvík, skrivaðu vit, at spælið hjá hoyvíkingum vísti seg at koyra nógv betur, tá ið leikandi venjarin, Henrik Gerster, helt seg uttan fyri vøllin. Um Gerster hevur tikið okkara orð til eftirtektar, skal verða ósagt, men stóri danin var í hvussu so er als ikki á vøllinum sunnudagin.

## Breiddin og Johan

Eitt skifti móti endanum av fyrra hálvleiki, sá H71 út til at fara hótta Kyndil aftur, men tá ið tað stóð eitt sindur á, vísti Finnur Hansson ábyrgd, og hann skeyt nøkur týðandi mál innan fyri nakrar fáar minuttir beint fyri hálvleik.

Kyndil var á odda við fimm málum í hálvleikinum, 18-13, og ein av høvuðsorsøkunum til at tað gekk so væl hjá heimaliðnum at halda seg fimm mál framman fyri H71, var tann, at Johan Danielsen í Kyndla-málinum spældi ein frálíkan dyst. Ferð aftaná ferð bjargaði hann frá púra leysum hoyvíkingum, og serliga vengurnir hjá H71 høvdu ilt við at fáa bóltin framvið Johan.

Eisini kostaði tað hoyvíkingum dýrt, at teir misnýttu so nógv brotskøst. Fýra av sjey brotskøstum vóru brend, og tað er ov nógv. Harumframt var tað alt ov ofta, at Kyndil skoraði upp á returar, sum verjan hjá H71 ikki fekk fatur á.

Beint eftir steðgin royndi H71 seg við at verja rættuliga offensivt. Við einari sonevndari 3-2-1 verjuskipan royndu teir at bróta rútmuna í álopsspælinum hjá Kyndli, og tað riggaði eisini eina løtu. Teir fingu minkað um munin niður í trý mál, og høvdu eisini møguleika til at minka niður í tvey mál, men gamli Kyndlaleikarin Sigtór Andreasen misnýtti brotskastið við støðuna 22-19 miðskeiðis í seinna hálvleiki.

Ein tann størsti munurin á liðunum báðum í dystinum sunnudagin var óivað breiddin á liðnum. Kyndil hevur kanska landsins størstu breidd, og teir kunnu skifta nógv út á liðnum, uttan at liðið gerst veikari av tí sama. Til dømis sótu menn sum Josef Abrahamsen, Jónleif Sólsker og Rókur Akralíð á beinkinum, tá ið dysturin byrjaði.

## Hvussu við mikukvøldinum

Mikukvøldið skulu bæði liðini aftur í eldin, tá ið seinnu hálvfinalurnar í Coca-Cola kappingini verða leiktar. Hoyvíkingar skulu inn á Skála at dystast við StÍF, sum vann fyrra dystin í Hoyvík við einum máli. Hetta verður uttan iva ein torfør, men ikki ómøgulig uppgáva hjá H71, sum noyðist at satsa upp á steypakappingina, um teir skulu vinna felagnum nakran heiður í ár.

Kyndil skal eins og H71 spæla á útivølli mikukvøldið. Teir skulu norður til Vestmanna, har teir skulu dystast við arvafíggindarnar úr VÍF, sum vunnu fyrra dystin í Havn við einum máli. Nú VÍF sunnudagin tapti fyri kollfirðingum, eru teir í Vestmanna uttan iva sera uppsettir til dystin mikukvøldið, tá ið teir fáa møguleika fyri at reisa seg aftur eftir óvæntaða ósigurin fyri kollfirðingum.

**Kyndil-H71 30-23 (18-13)**
**Kyndil:** Jakob Jónsson 5(1), Høgni Klein 5(1), Finnur Hansson 5, Hans Áki Dal-Christiansen 4, Janus E. Sørensen 4, Ragnar Stakksund 3, Rókur Akralíð 2, Josef Abrahamsen 1, Jónleik Sólsker 1(1)
**H71:** Piti Negru 9, Esbern Patursson 4, Halgir Dahl Olesen 4(1), Sigtór Andreasen 4(2), Johnny Durhuus 1, Høgni M. Joensen 1
**Brotskøst:** Kyndil 4(3), H71 7(3)
**Útvísingar:** H71 6
**Dómarar:** Poli Hansen og Hartvig Joensen - Tóktust viðhvørt eitt sindur ivasamir í sínum avgerðum, og marginalarnir vóru avgjørt ikki til fyrimuns fyri hoyvíkingar. Hinvegin hevði teirra avrik onga ávirkan á úrslitið